## The Dreams í Fuglafirði

Tann 20. desember spæla The Dreams í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta er fyrsta framførsla teirra í Føroyum, síðani Summarfestivalin. The Dreams fara at spæla góða, gamla føroyska tilfarið, men eisini sangir av nýggjastu fløguni. The Dreams hava júst á 3. sinni havt ein sang liggjndi sum nummar eitt á danska Boogie listanum. Atgongumerkir kunnu keypast á teleshop.fo frá mikudegnum, men sølan er avmarkað, tí bert 700 atgongumerkir eru til taks.

-do-



## Frændafundur 6 útkomin

Forlagið Fróðskapur hevur givið út bók við 24 fyrilestrum frá føroyskari-íslendskari ráðstevnu í Tórshavn 26.-28. juni 2007. Greinarnar eru helvt um helvt á føroyskum og íslendskum við enskum samandrátti. Bókin er 304 blaðsíður og kostar 290 krónur. Frændafundur er tvímálsligur, tað merkir at fyrilestrar-nir vórðu hildnir á íslendskum ella føroyskum, og sama býtið er galdandi fyri prentaðu útgávuna, sum eisini hevur stuttar enskar samandráttir. Ráðstevnan er tvørfaklig, og á sætta fundinum vóru evnini: mál, støðan hjá samkyndum, støðan hjá útlendingum, barnabókmentir, kommunusamanlegging, myndlist tey seinastu tíggju árini, tónleikur og binding og sniðgáva.

# TAKS tekur sosial atlit

**TAKS hevur sínar føstu mannagongdir at arbeiða eftir, men tað merkir ikki, at neyðug sosial atlit ikki verða tikin. – Men viðhvørt er avgerðin ikki okkara, siga Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóri, og Bent Ottosen, leiðari fyri innheintingini hjá TAKS**



*Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóri, og Bent Ottosen, innheintingarleiðari hjá TAKS. - Arbeitt verður eftir greiðum mannagongdum, siga tey bæði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

MANNAGONGDIR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Samskifti er lykilin.

Í kjalarvørrinum av einum sakarmáli, sum TAKS førdi móti einum nú 68 ára gomlum pensjónisti, hvørs fíggjarligu viðurskifti eru so, at hann ongan møguleika hevur at rinda nakað aftur, hevur Sosialurin vent sær til TAKS fyri at vita, hvussu stovnurin arbeiðir.

- Tá sjálvuppgávurnar ikki eru í lagi, verða tær viðgjørdar og kannaðar. Men er tað so, at skatturin av teirri upphædd, sum skattgjaldarin hevur sloppið sær undan fer upp um 500.000 krónur í landsskatti og 100.000 tá talan er um mvg verða tær lætnar beinleiðis til fútan at taka støðu til. Og sjálvt um vit ikki prinsipielt umrøða einstøk mál, so var tað hetta, sum er hent í hesum førinum, greiða Hjørdis Gaard og Bent Ottosen frá.

Tað er tískil ikki TAKS, men fútin sum tekur avgerð um, hvørt ákæra verður reist í slíkum føri.

TAKS hevur ein greitt orðaðan innheintingarstrategi politikk, sum gongur út upp á at málrætta og tilllaga innheintingina.

»Mannagongdir skulu geva størst møguligt avkast og verða soleiðis, at vøkstur í eftirstøðum verður steðgaður. Brúkast skal minst møgulig orka og tað skal vera framhaldandi fokus á rættartrygd borgaranna og virkisins«.

Fyri at betra um samskiftið við kravánara skal »Innheintingarætlanin stuðla undir málsetningin at økja um talið av borgarum, sum av sær sjálvum lata inn og gjalda rætt«.

### Við- og mótspælarar

TAKS arbeiðir eftir einum pyramidu-prinsippi (complience), har niðasta lagið eru tey, sum halda sínar skyldur.

Síðani kemur eitt lag, har fólk hava vilja, men kanska ikki evni at halda skyldurnar.

Soleiðis gongur upp eftir, til tú ert á toppinum, har fólk decidera snýta við vilja.

- Okkara mál er at flyta fólk so langt niður í pyramidustrukturinum sum gjørligt, sigur Bent Ottosen.

Strategiin hjá innheintingardeildini tekur støði í teirri hugsan, at meginparturin av borgarum og virkjum ynskja at gjalda til tíðina. Í hesum høpi verður skilt millum viðspælarar og mótspælarar.

Viðspælarar eru borgarar og virki, sum hava viljan at rinda. Hesi fáa vanliga eina gjaldsavtalu og ansað verður eftir, at eftirstøðan ikki økist, um so er, at tey ikki megna at gjalda til tíðina.

Tá tað kemur til mótspælarar verða hesir býttir í tveir bólkar, tey, sum hava evni, men ikki viljan at gjalda, og so tey, sum hvørki hava evni ella vilja at gjalda.

- Tað er jú heldur ikki so, at fólk verða revsað, um tey ikki hava peningin tøkan her og nú. Tað týdningarmesta er, at vit fáa uppgerðirnar inn, tí tað sparir eisini okkum nógva tíð, sigur Hjørdis Gaard.

Uppgávan er at fyribyrgja eftirstøðum, og tí er fokus á átøkum, sum kunnu forða fyri at virki og borgarar koma í eftirstøðu.

### Ávísar vinnugreinar

Hon sigur, at TAKS alla tíðina roynir at kunna síni viðskiftafólk so væl sum gjørligt, og konstruktivur kritikkur er altíð væl komin.

Tey bæði skilja eisini væl, at spurnartekin verður sett við nyttuna av at brúka tíð og orku upp á mál, sum framman undan eru dømd at miseydnast, og er m.a. eisini hesin spurningurin, sum er grundarlag undir avgerð um hvørji eftirlit vera gjørd-

Í teimum førum har upphæddin skattagjaldarin hevur sloppið sær undan fer upp um 500.000 krónur so ger løgdeildin hjá okkum ikki meiri við málið, men sendir tað beinleiðis til fútan. Hesin tekur so støðu til, um hann fer víðari við málinum, tí tað er ikki TAKS, sum stevnir nøkrum, siga Hjørdis Gaard og Bent Ottosen.

Er talan um upphæddir undir ta hálvu milliónina, verður málið viðgjørt av TAKS, og hvørt málið sær verður viðgjørt gjølla við atliti at bæði fíggjarligu orkuna hjá viðkomandi og sosialu viðurskiftini.

Vit hyggja eftir umstøðunum sum heild, og tá viðurskiftini tala fyri tí, finna vit sum oftast útvegir fyri at fólk kunnu sleppa frægari burtur úr støðuni. Tað er heldur ikki komið fyri í mínari tíð, at TAKS hevur koyrt fólk frá húsi og heimi. Tey skulu jú eisini liva, sigur Bent Ottosen, leiðari fyri innheintingini hjá TAKS.

Tað er tó ein sannroynd, at TAKS nýtir 80% av teirra orku upp á 20% av viðskiftafólkunum. Men tað er kortini ikki so, at »revolvarametodir« verða nýttar.

Okkara einasta mál er at fáa pengarnar inn, og tað gerst betri við lógvataki heldur enn lurki, sigur Bent Ottosen.

### Sosialt atlit

Tá Sosialurin setti spurnartekin við nevnda sakarmál, so var tað í veruleikanum ikki TAKS, sum var inni í málinum meiri, men fútin. Og tey bæði siga, at stovnurin so avgjørt tekur atlit til bæði sosialu og fíggjarligu støðuna hjá fólki.

Í teimum førunum, har eitt ígongdverandi virki skyldar skatt ella MVG seta vit inn. Vit kunna fara so langt sum at krevja ein virkisbygning á tvingsilssølu, fyri at fáa peningin inn, sigur Bent Ottosen.

Hann vísir á tað órímiliga í, at virkir bara kunnu halda fram við virkseminum, samstundis sum tey skylda landinum pening – og bara lata sum einki.

Men TAKS er ikki tann ómenniskjaligi stovnurin, sum summi kanska ganga runt og halda.

- Vit verða nokk ongantíð mest væIdámdi stovnurin í landinum, men vit gera okkum veruliga ómak fyri at upplýsa okkara viðskiftafólkum so væl sum møguligt um viðurskifti, sum eru teimum viðkomandi. Og tí taka vit fegin móti konstruktivum kritikki, tí vit vilja fegin verða okkara viðskiftafólki so hjálpsom sum gjørligt, sigur Hjørdis Gaard.

Tað er eisini av hesum sama, at TAKS nú hevur sett á stovn eina nýggja kundatænastu, sum skal lofta øllum teimum vanligu spurningunum um skatt og MVG. Hetta er ein tænasta, sum verður útbygd um tað mundið, tá sjálvuppgávrnar eru fyri.

- Byrjað verður hvønn morgun við at gjøgnumganga spurningar, sum tænastan hevur fingið dagin fyri, so vit alla tíðina eru ajour, sigur Hjørdis Gaard.

Og á innheintingardeildini eru tey eisini alla tíðina ajour.

- Øll mál eru serstøk. Vit hyggja at teimum objektivt og sakligt, men tað merkir ikki, at øll mál verða viðgjørd eins. Har er tað, at sosial og onnur atlit koma inn í myndina, sigur Bent Ottosen, innheintingarleiðari hjá TAKS.